# Jóhannes í Nesinum farin



Týsdagin 19. august andaðist Jóhannes Poulsen á Válinum, vanliga nevndur Jóhannes í Nesinum, 84 ára gamal.

Jóhannes vaks upp í Nesinum og búði har til miðskeiðis í sjeytiárunum, tá ið hann og Tordis, sum er ættað úr Kollafirði, fluttu í nýggj hús inni við Breiðánna á Válinum.

Foreldrini vóru Súsanna Olsen av Fjørðinum í Vestmanna, og Sofus Poulsen, ættaður frá Svartá í Saksun.

Fyri umleið 75 árum síðani vóru rættiliga nógv børn í skúlaaldri á Válinum, og tey gingu í skúla í bygdini. Jóhannes hevði hug til skúlan, og Christian Høj, sum var lærari á Válinum og í Leynum, eina viku á hvørjum staðnum, plagdi at siga, at Jóhannes var ein av teimum bestu næmingunum, sum hann nakrantíð hevði í skúlanum.

Men tá á døgum var bara undantakið, at ungir dreingir á bygd fingu aðra skúlagongd enn barnaskúlan.

Víkin lá full av sluppum, bæði teimum, sum hoyrdu til Vestmanna, og teimum úr Vágunum, sum høvdu vetrarlegu fyri teymi á vikini í Vestmanna.

Á vári var eitt yðjandi lív av fólki, sum riggaði til, og har var mangan nógv fremmandafólk í bygdini.

Einki lá huganum nærri hjá einum 14 ára gomlum dreingi tá enn sjógvurin, og sum teir allar flestu har um leiðir, fór Jóhannes til skips 14 ára gamal.

Rættiliga tíðliga gjørdist hann motorpassari og sigldi síni mestu ár við teimum skipum, sum Viggo Dam, Viggo í Skúlanum, førdi.

Jóhannes var eisini við ta ferðina, tá ið Union Jack varð søkt av týskum kavbáti á víðum havi millum Føroyar og Skotland.

Manningin bjargaði sær í lítla bjargingarbátinum og kom illa tuskað til lands á útskerði, har teir umsíðir fingu samband við fólk á vita har í nánd.

Jóhannes var eisini við ta tiltiknu ferðina út um Sund, tá ið motorbáturin Helgi steðgaði upp í ódnarveðri og fór skolandi við streyminum dygst norður við Streymoyarlandinum.

Tað eydnaðist við góðum sjómansskapi og dugnaskapi annars at fáa fólkið upp á land í brattlendinum og síðani at ganga upp bygdina. Helga roknaði eingin við at síggja aftur.

Tað løgna hendi kortini. Morgunin eftir sást Helgi rekandi suðureftir í sundinum og varð fingin inn á víkina.

Í nøkur ár var Jóhannes við trolara.

Tá ið SEV-byggingin varð sett í verk í 60-árunum, var Jóhannes ein teirra, sum gjørdi tunnlarnar til vatnveitingarnar, og seinni fór hann at stavast sum sveisari á skipasmiðjuni.

Úti í Nesi giftust Jóhannes og Tordis inn hjá ommu og abba, og tey eiga 4 børn, Sunnrið, Bergfríð, Ásvør og Páll.

Har var ikki nógv húsarúm í Nesinum, men hjartarúmið og gestablídnið var har sum fáar ella helst onga aðrastaðni, ið eg havi upplivað.

Har kom nógv fólk á gátt. Nógv vóru tey, sum spákaðu sær ein túr út í Nesið góðveðursdagar, og nógv teirra stukku inn á gólvið, og nær ið vit komu í báðar ættir, eisini at ferðast, so var pláss fyri okkum. Føðingardagar vóru merkisdagar, sum seint verða gloymdir.

Hetta hjartalag og hetta gestablídni tóku Jóhannes og Tordis við sær inn í nýggja heimi við Breiðánna, og eg dugi bara at orða tað soleiðis, at tað hevur verið hjartanemandi at uppliva tað samanhald, sum hevur verið millum tykkum gomlu og børn tykkara, og at síggja, hvussu Jóhannes og Tordis so hvørt eisini hava tikið ímóti barnabørnunum, teirra vinfólkum og makum og børnum teirra, ja eisini teirra næstu, so hvørt sum ringarnir hava breitt seg.

Sjálvur havi eg mest at kalla kent meg sum barn í húsinum í Nesinum, og eg fari at enda hesi fátæksligu orð við at lýsa frið yvir minnið um Jóhannes mammubeiggja, og takka fyri at mær hevur untst at liva so tætt upp at tykkum í Nesinum.

Tað er tómligt hjá tykkum uttan Jóhannes, og tað skal vera mín vón, at tey nógvu góðu minnini so líðandi vinna á sorgini og sakninum. Mína inniligastu samkenslu sendi eg tykkum øllum, sum hava untst at liva Jóhannesi nær.

**Pauli Nielsen**

# Sjónleikaraskeið í Klaksvík

## – rødd, rørsla og tekstur –

TÍÐINDASKRIV
*frá MáF*

Vikuskiftið 29.-31. august 2003 skipar MáF fyri sjónleikaraskeiði í Klaksvík.

Hetta er sama skeið, ið hildið verður í Tórshavn 5.-7. september 2003. Av tí, at áhugin fyri skeiðnum er sera stórur, er avgjørt eisini at hava eitt skeið í Klaksvík.

Skeiðið er ætlað sjónleikarum yvir 18 ár.

Spælir tú sjónleik, er neyðugt at hava eina rødd, sum hoyrist, og sum er áhugaverd at lurta eftir, eisini er neyðugt at kroppurin er ein aktivur partur í frásøgnini.

Øll hava vit eina rødd, men tey flestu av okkum hava ikki hóming av, hvørja kraft og eginleikar hon rúmar. Á hesum skeiðnum verður arbeitt við at sameina rødd, kropp og medvit.

Undirvíst verður út frá arbeiðshátti, sum enska sjónleikarakvinnan Nadine George er komin fram til, eftir í 35 ár at hava granska í samskiftinum millum rødd, kropp og medvit. Nadine George hevur verið í Føroyum og undirvíst sjónleikarum í Leikarafelag Føroya, og hava føroyskir sjónleikarar eisini luttikið á skeiðum hjá Nadine George í London.

Arbeiðahátturin er sera einfaldur, spennandi og stuttligur. Arbeitt verður við leikbrotum úr Macbeth hjá William Shakespeare.

Umframt at undirvísa sjónleikarum í hesum arbeiðshátti, hevur Nadine George eisini undirvíst fólki, sum brúka sína rødd og kropp nógv í arbeiðnum, t.d. lærarum, útvarps- og sjónvarpsfólki.

Skeiðið byrjar fríggjakvøldið 29. august 2003 kl. 19 og endar sunnukvøldið 31. september kl. 17.

Lærari er Egi Dam sjónleikari úr Leikarafelag Føroya.

Pláss er fyri 12 luttakarum. Tilmeldan á skrivstovuni hjá MáF, tlf. 315624, 315688 ella á maf@maf.fo í seinasta lagi 26. august 2003.

## Tøkk

Vit takka øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegnum.

**Bina og Heri, Klaksvík**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymsan hátt gleddu meg á 70-ára føðingardegi mínum.

**Kærar heilsanir**
**Helga Strøm, Trongisvágur**

# Kingo í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

Nú sunnudagin 24. august 2003 kl. 20.00 fara teir tríggir: Símun Rasmussen, Niels Midjord og Petur Jacob Eliasen at syngja kingo í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hetta er sama konsert, sum varð hildin í Sjóvar kirkju síðsta sunnudag og sum var partur av mentanarstevnuni hjá Norðurlandahúsinum.

Teir 14 sálmarnir, sum teir tríggir framføra, eru allir úr 1859 útgávuni av Kingobók og teir verða sungnir soleiðis, sum Berint Rasmussen, Berint uppi í Gerði (1885-1975) sang teir fyri soninum Símuni Rasmussen fyrst í seksti árunum. Hetta er sostatt sálmasangur, sum hann man hava ljóðað í Sjóvar kirkju til fyri um hundrað árum síðan.

Skift verður ímillum solosang á cappella, felagssang á cappella, solosang við gittarfylgispæli og felagssang við gittarfylgispæli. Men við tað at tað ikki var gamalt at nýta fylgispæl til tey gomlu løgini, verða teir fimm sálmarnir við gittarfylgispæli sungnir á føroyskum.



koyrikortið
Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú koyrir 30 km skjótari, enn loyvt er?
Harumframt ført tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og dómurin er galdandi í 3 ár!

bilbeltið
Minst til bilbeltið!
Helvtin av teimum, sum hava látið lív í ferðsluvanlukkum og ikki vóru í bilbelti, høvdu verið á lívi, um tey nýttu bilbeltið.

alkohol
Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú hevur meira enn 0,5 promillu av alkoholi í blóðinum?
Harumframt ført tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og dómurin er galdandi í 3 ár!

víkiskylda
Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú fremur týðandi brot á víkiskylduna?
Harumframt ført tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og, dómurin er galdandi í 3 ár!

koyrikortið
Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú koyrir 30 km skjótari, enn loyvt er?
Harumframt ført tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og dómurin er galdandi í 3 ár!

TASKI gólvvaskimaskinur
-øll model við innbygdum lagri!
Frá okkara leverandøri hava vit fingið tilboð uppá avmarkaða nøgd!
TASKI gólvvaskimaskinur
-til óveruligar prísur!
Spar upp til nógvar túsund krónur!
Til dømis:
TASKI 800 vanligur prísur kr. 76.735,-
**Nú kr. 55.600,-**
við MvG - frítt leverað
Skulu tygum keypa gólvvaskimaskinur er nú møguligt at velja millum fleiri ymiskar við stórum avsláttri.
Ongantíð verið bíligari! Keyp NÚ! Avmarkað nøgd!
Vælegnaðar til lagurbygningar, handlar, skúlar v.m.
Ring og hoyr nærri!
A. H. Jensen
alt innan reingerð
Stoffalág 25 • FO-100 Tórshavn
tlf.: 322676 • fax: 318101
e-mail: a_jensen@post.olivant.fo

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

J. Bronckgøta 35 | P. O. Box 370 | FO-110 Tórshavn
tlf 34 59 60 | fax 34 59 52 | T-postur: cargo@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo
Jákup Mikkelsen flytur við
SMYRIL LINE




SMYRIL LINE